FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Løgtingið**

**Argir**, 8. mai 2017

**J.Nr.:** 17/00139-10

**Viðgjørt:** PAL

**Løgtingsmál nr. 137/2016: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**. **(Skattalógin)** (Strika skattaafturbering til bare-boat leigað skip uttan fyri FAS)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
(Strika skattaafturbering til bare-boat leigað skip uttan fyri FAS)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 10. apríl 2017, verður § 63 a, stk. 1, nr. 2 strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá framløgudegnum.

**§ 3**

*Stk. 1.* Fyri skip, sum framløgudagin eru bare-boat leigað til Føroya, fer skipanin úr gildi 31. desember 2018, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Fyri skip, sum framløgudagin eru bare-boat leigað til Føroya og sum lúka allar treytirnar fyri at verða skrásett í FAS, fær broytingin virknað, tá verandi leiguavtalur ganga út.

**Kapittul. 1. Almennar viðmerkingar.**

**Endamál við broytingini**
Endamálið við hesari lógarbroyting er at nágreina galdandi ásetingar og at tryggja altjóða umdømi Føroya við atliti at altjóða skipaskráseting.

Til tess at røkka hesum verður mælt til, at reiðarí ikki longur kunnu fáa endurgoldnan tann skatt, ið er goldin av manningum við skipum, ið reiðaríini hava leigað uttan manning (bare-boat leigað), men ikki skrásett í føroysku skipaskránni FAS.

Hetta samsvarar við álitið um sjóvinnu, sum varð almannakunngjørt 5. mai 2017.

**Galdandi reglur**

Føroysk reiðarí fáa í dag bornan aftur tann skatt, ið verður goldin av manningum á skipum, ið eru skrásett í føroysku altjóða skipaskránni FAS.

Føroysk reiðarí fáa somuleiðis bornan aftur tann skatt, ið verður goldin av manningum á skipum, ið tey hava leigað (uttan manning), hóast hesi ikki eru skrásett í føroysku skipaskránni FAS.

Mett verður, at henda regla um skattaafturbering fyri skatt, goldnan av manningum á skipum, skrásettum í øðrum londum, kann vera við til at skaða umdømið hjá føroysku skipaskránni.

Formliga lógargrundarlagið undir FAS er at finna í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um føroyska altjóða skipaskrá, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 15. mai 2014.

Føroyska Altjóða Skipaskráin (FAS) varð sett á stovn í 1992. Skipanin varð sett í verk, til tess at farma- og ferðafólkaskip, ið tá vóru skrásett undir føroyskum flaggi, ikki skuldu flagga út og fara at sigla undir øðrum flaggi.

Bæði FAS-lógin og skattareglurnar um FAS (skattalógin og ásetingarlógin) eru síðani broyttar fleiri ferðir.

Fyri at gera FAS-skipanina kappingarføra við aðrar líknandi skipanir, vórðu reglurnar um FAS í skattalógini broyttar munandi við løgtingsmáli nr. 189/2007.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður m.a. sagt, at landsstýrið nú er farið undir at gera broytingar í FAS-skipanini við tí endamáli at skapa eina kappingarføra hákvalitets skipaskrá, ið skal vera fult nøktandi hjá føroyskum skipum at vera í, og vera áhugaverd hjá útlendskum skipum at koma inn í.

**Ógreiðar ásetingar í verandi lóggávu**

Verandi lóggáva hevur ógreiðar og ósamsvarandi ásetingar. Í einari lógarreglu verður kravt, at bare-boat leigað skip uttan fyri FAS skulu lúka allar treytir, ið ásettar eru í FAS-lógini, meðan tað í aðrari lógarreglu verður kravt, at hesi skip einans skulu lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í FAS-lógini.

TAKS setir tí ikki nakrar treytir, áðrenn goldið verður út.

Lógarásetingarnar um skip, ið føroysk reiðarí leiga við ongari manning (bare-boat leiga), men ikki skráseta í FAS-skránni, eru at finna í § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. og í § 63 a, stk. 1, nr. 2 í skattalógini og í § 8, stk. 1, 2. pkt. í ásetingarlógini.

§ 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í skattalógini ásetir, at skip, ið føroysk reiðarí leiga við ongari manning, verða javnmett við føroysk skip.

Men í § 63 a, stk. 1, nr. 2 í skattalógini, sum heimilar afturbering av skatti, sigur, at bare-boat leigaðu skipini skulu lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá, men henda lógaráseting í FAS-lógini sigur einans, at í ”Føroysku Altjóða Skipaskránni” verða tikin upp føroysk skip, sum eru 100 skrásett tons brutto ella meira.

Samstundis verður ásett í § 8, stk. 1, 2. pkt. í ásetingarlógini, at skip, skrásett í FAS, ella skip, sum eftir § 2, stk.1, litra j, 2. pkt. verður javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroyskt, høvdu lokið treytirnar í løgtingslógini um FAS. Í hesi grein er krav um, at bare-boat leigað skip skulu lúka allar treytirnar, ið ásettar eru í FAS-lógini.

Við uppskotnu lógarbroytingini verða skip og manningar á skipum, ið eru leigað uttan manning, men ikki skrásett í føroyskari skipaskrá, framhaldandi skattað eftir galdandi reglum, men reiðaríini fáa frameftir ikki afturbornan tann skatt, ið manningarnar gjalda.

Fram til endan á 2017 kunnu reiðarí tó fáa bornan aftur skatt, ið manningar gjalda, um inntøkan, skatturin er goldin av, er vunnin frá skipi, ið varð leigað, áðrenn hetta lógaruppskot var lagt fyri Løgtingið. Fyri skip, sum lúka allar treytirnar fyri at verða skrásett í FAS, fær løgtingslógin tó ikki virknað, fyrr enn verandi leiguavtalur fara úr gildi.

Tað verður hartil framhaldandi møguligt at bare-boat leiga skip og skráseta skipini í FAS.

**Umdømið hjá føroysku skipaskránni**
Tað er av stórum týdningi fyri Føroyar at hava eina skipaskrá, ið hevur eitt gott altjóða umdømi. Tað er tí sera óheppið, at International Transport Workers Federation, ITF, ið er samtak av flutningsarbeiðarafeløgum, hevur útnevnt FAS og føroyska flaggið at vera eitt hentleikaflagg.

Hugtakið “hentleikaflagg” stavar í ITF-høpi frá fimmti árunum, tá vesturlendsk reiðarí í stórum tali tóku síni skip úr heimligu skipaskráunum og skrásettu tey í londum, har myndugleikarnir settu lítil og ongi krøv til reiðarar við atliti til tekniska standardin, trygdina og manningina.

Føroyar komu á listan hjá ITF yvir hentleikafløgg, eftir at norðurlendsk sjómannafeløg kærdu til ITF, eftir at fleiri norsk reiðarí høvdu flaggað síni skip um til føroyskt flagg. Føroyskir myndugleikar og føroysku manningarfeløgini eru ósamd í avgerðini hjá ITF, tí Føroyar, sum flaggland, hevur somu lóggávu sum onnur hágóðsku fløgg.

**Hoyring:**

Uppskotið hevur verið til hoyringar í tveimum umførum.

Upprunauppskotið er sent niðanfyri nevndu til hoyringar:

- Reiðarafelagnum fyri Farmaskip
- Vinnuhúsinum
- Sjóvinnustýrinum
- TAKS
- Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum

Harumframt hevur uppskotið ligið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya Landsstýri.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip (RfF) hevur sent hoyringssvar til upprunauppskotið.

RfF finst at, at freistin at gera viðmerkingar var so stutt, tí mett verður, at uppskotið kann fáa eyðmerktar og munandi avleiðingar fyri vinnuna.

RfF var sum so ikki ímóti uppskotinum, men treytað av, at uppskotið verður broytt.

RfF eftirlýsti eina breiða lýsing av bare-boat leigu uttanfyri FAS og vísti í hesum sambandi á, at tað kunnu vera onnur enn skattlig atlit fyri at bare-boat leiga skip uttanfyri FAS.

RfF mælir til, at partar av viðmerkingunum verða strikaðar, eftirsum uppskotið ikki snýr seg um FAS, men um bare-boat leigu uttanfyri FAS.

RfF mælti at enda til eina longri skiftistíð.

*Fíggjarmálaráðið harmast um, at hoyringstíðin gjørdist so stutt. Orsøkin til hetta er, at uppskotið hevur bráðskund, og tí er neyðugt at broyta galdandi lóggávu.*

*Við atliti til innihaldsligu viðmerkingarnar, hevur stjórnarráðið broytt undirheitið á uppskotinum og viðmerkingarnar til uppskotið, soleiðis at tað greiðari framgonur, at uppskotið einans snýr seg um skip uttanfyri FAS.*

*Í tillagaða uppskotinum er skiftistíðin fyri bare-boat leigað skip uttan fyri FAS, sum uppfylla treytirnar fyri at kunna vera í FAS, longd munandi*

TAKS hevur eisini sent hoyringssvar til upprunauppskotið.

Viðmerkingarnar frá TAKS miðsavna seg um almennu viðmerkingarnar til uppskotið.

TAKS mælir eins og RfF til, at partar av almennu viðmerkingunum til upprunauppskotið verða strikaðar.

*Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar til hoyringssvarið: Við atliti til innihaldsligu viðmerkingarnar hevur stjórnarráðið sum omanfyri nevnt broytt undirheitið á uppskotinum og*

*viðmerkingarnar til uppskotið, soleiðis at tað greiðari framgongur, at uppskotið einans snýr seg um skip uttanfyri FAS.*

Viðmerkingarnar frá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum miðsavna seg eins og viðmerkingarnar frá TAKS um almennu viðmerkingarnar til uppskotið.

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið mælir harnæst Fíggjarmálaráðnum til ikki at broyta skattaafturberingsreglurnar í mun til skip skrásett í FAS.

*Fíggjarmálaráðið fer enn eina ferð, at vísa til viðmerkingar stjórnarráðsins omanfyri, har sagt verður, at uppskotið einans snýr seg um skip uttanfyri FAS.*

Eftir at uppskotið var broytt, sendi Fíggjarmálaráðið hoyringspørtunum tillagaða uppskotið til kunnleika.

Tað komu tvey hoyringssvar til tillagaða uppskotið.

Tað eina hoyringssvarið kom frá P/f. Thor, meðan hitt hoyringssvarið kom frá P/f. Sandgrevstur.

Eftir at uppskotið er broytt, verður víst á, at lógaruppskotið er nøktandi fyri P/f. Thor.

*Fíggjarmálaráðið tekur til eftirtektar, at tillagaða lógaruppskotið er nøktandi í mun til virksemi hjá P/f. Thor.*

P/f. Sandgrevstur vísir á, at felagið kemur at verða hart rakt av lógaruppskotinum

Víst verður á, at felagið hevur tvey skip, sum koma at verða rakt av uppskotinum.

Hesi skip eru mikið gomul, og tað er tí ógjørligt at fáa tey góðkend í FAS.

Serliga er tað tann sera stutta skiftistíðin, sum kemur felagnum dátt við.

*Fíggjarmálaráðið skilir viðmerkingarnar hjá felagnum og hevur tí longt ígildiskomuna fyri skip, sum longu eru í skipanini, men sum ikki lúka treytirnar fyri at verða skrásett í FAS, við einum ári fyri at geva nevndu feløgum betri møguleika fyri at tillaga virksemið.*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Uppskotið fær helst fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men ikki ber tó til at seta tøl á, hvussu stórar hesar avleiðingar verða. Tað veldst um, hvat reiðaríini velja at gera.

Velja tey at halda fram við sama virksemi, uttan at fáa skattaafturbering, velja tey í staðin at skráseta skipini í FAS, ella velja tey at broyta virksemið annaðhvørt við at niðurleggja virksemið ella leggja tað í útlendskt felag.

Kanning, ið Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálráðið hava gjørt fyri inntøkuárið 2015 vísir, at feløg, ið leigaðu skip uttan manning og ikki skrásettu tey í FAS,

- rindaðu góða hálva millión í felagsskatti og tonsaskatti,
- rindaðu slakar tríggjar milliónir í arbeiðsmarknaðargjøldum,
- rindaðu áleið 140 milliónir í hýrum til útlendingar,
- rindaðu slakar 20 milliónir í hýrum til føroyingar,
- fingu skattafturbering upp á 54 milliónir krónur og
- keyptu vørur og tænastur fyri góðar 27 milliónir krónur

Møguligar mistar inntøkur skulu haldast upp ímóti møguligum krøvum frá grannalondum okkara og avleiðingunum av, at føroyska flaggið kann verða útnevnt sum hentleikaflagg.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Velja fleiri reiðarí at skráseta skip í FAS-skránni, fer Sjóvinnustýrið at fáa fleiri eftirlitsuppgávur.

**Avleiðingar fyri borgarar**
Uppskotið fær avleiðingar fyri borgarar í tann mun, reiðarí velja at broyta teirra virksemi.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Eftir uppskotinum ber ikki til framyvir at fáa skattaafturbering fyri skip, sum ikki lúka treytirnar fyri at verða skrásett í FAS. Talan er her um skip, har tekniski standurin á skipinum ella rakstrarsøgan hjá skipinum ella reiðarínum, sum eigur ella rekur skipið, talar ímóti skráseting, hetta kann t.d. vera orsakað av, at skipið er gamalt. Mett verður, at hesi skip alt annað líka dálka meira enn skip, sum lúka treytirnar fyri at verða skrásett í FAS.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið fær avleiðingar fyri umsiting av tvískattaavtalum.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | Nei |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Ásetingin ber í sær, at heimildin at endurrinda skattin, ið manningar á bare-boat leigaðum skipum, sum ikki skrásett í FAS, rinda, verður strikað.

Sum bare-boat leigað skip er at skilja skip, sum føroyskt reiðarí leigar uttan manning.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Til § 3**
Skiftisregla fyri skip, ið eru leigað áðrenn framløgudagin av hesum lógaruppskoti.

Av tí, at striking av § 63 a, stk. 1, nr. 2 í skattalógini kann fáa sera stórar avleiðingar fyri eitt reiðarí, verður ásetingin sett úr gildi í stigum.

Skattaafturbering eftir framløgudagin er treytað av, at bare-boat leigarin váttar mótvegis TAKS, at skipið er bare-boat leigað áðrenn framløgudagin. Hetta verður gjørt við at senda TAKS leiguavtaluna.

Við atliti til § 3, stk. 2, so er tað bare-boat leigarin, sum umvegis Sjóvinnustýrið skal vátta mótvegis TAKS, at skipið uppfyllur allar treytirnar fyri at verða skrásett í FAS. Bare-boat leigarin ber kostnaðin fyri eina slíka váttan.

**Hjáløgd fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringssvar frá Reiðarafelagnum
Fylgiskjal 3: Hoyringssvar frá Taks
Fylgiskjal 4: Hoyringssvar frá UVMR
Fylgiskjal 5: Hoyringssvar frá Sandgrevstri
Fylgiskjal 6: Hoyringssvar frá Thor

Fíggjarmálaráðið, 8. mai 2017

**Kristina Háfoss**
Landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason